ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
341800

HB-EB/STREYMUR:

Bagge upp á síðuna av Rúna

Væl mannað oddalið vitjar HB, sum í gjár setti Sámal Erik Hentze síðusettan venjara við Rúna Nolsøe, ið framvegis er HB venjari

FÓTBÓLT
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Eftir soltnu úrtøkuna nógvu tær seinastu ferðirnar og harvið pláss á støðutalvuni, sum teir í sigursvanda HB ikki brýggja seg um og undan hesum kappingarárinum ikki høvdu roknað við, og í hvussu so er ætlað, hevur HB nevndin tikið avleiðingarnar.

Broytingar eru gjørdar í ábyrgdarbýtinum, og nýggjur maður er settur við síðuna av høvuðsvenjaranum Rúna Nolsøe. Talan er um Sámal Erik Hentze ella Bagge, sum hann verður nevndur.

Bagge fór til verka í Gundadali í gjárkvøldið, og sambært tíðindaskrivi frá HB eru teir báðir venjararnir síðusettir. Higartil hava Frankie Jensen og Áki Johansen verið hjálparmenn hjá Rúna Nolsøe. HB boðar frá, at teir báðir nú einki skulu hava við Formulaliðið at gera. Í staðin skulu teir fult og heilt taka sær av liðnum í 1. deild og unglingaliðnum.

Rúni Nolsøe ásannar fyri HB heimasíðuni, at úrslitini ikki hava verið nøktandi, og hann sigur seg taka til eftirtektar tær broytingar, sum nevndin hevur avgjørt at gera. Samstundis sigur hann seg gleða seg til at arbeiða saman við Bagga við teimum royndum, sum Bagge hevur frá Formulafótbólti.

- Tá ið ein slíkur møguleiki býðst, er tað lætt at taka av, tí HB er eitt sigursvant, stórt og spennandi felag við nógvum góðum spælarum, sigur Sámal Erik Hentze við HB heimasíðuna.

Sámal Erik Hentze hevur Formula royndir frá undanfarnum árum, tá ið hann hevur verið hjálparvenjari hjá Piotr Krakowski - í EB/Streymi.

Og tað er júst EB/Streymur, sum vitjar í Gundadali sunnudagin. Oddaliðið hevur havt blíðan byr síðani summarsteðgin. EB/Streymur hevur vunnið seks stig og skorað fimm mál, meðan einki er farið ígjøgnum hjá René Tórgarð.

Oddaliðið hevur havt blíðan byr síðani summarsteðgin. EB/Streymur hevur vunnið seks stig og skorað fimm mál, meðan einki er farið ígjøgnum hjá René Tórgarð

Einastu spælararnir hjá EB/Streymi, sum ikki eru tøkir, eru Høgni Zachariasen, sum nú er sloppin av við høkjurnar, men neyvan verður førur fyri at spæla fyrr enn eina ferð í næsta mánað, og Peter Foldgast. Danski álopsspælarin er í Danmark, har hann verður viðgjørdur fyri knæskaða.

Munurin millum EB/Streym og HB er tólv stig. Í HB tosa tey als ikki um gull í ár, men kanska ein lítil dreymur kann kveikjast, um tað eydnast at vinna á EB/Streymi og harvið at minka munin upp á toppin til níggju stig. Bæði í HB og EB/Streymi minnast tey væl, at tað áður hevur eydnast HB eftir summarsteðgin at vinna seg níggju stig inn á oddaliðið og í síðstu sekundunum í einum kappingarári at strúka avstað við FM heitinum fyri nøsini á EB/Streymi.

Tá ið HB í 8. umfari 25. mai vitjaði við Margáir var úrslitið 2-1 heimasigur.

SKÁLA-NSÍ:

Skála hevur hoyrt borgarstjóran

Men spælararnir á Skála ætla sær í kommunu uppgerðini at gera orðini hjá borgarstjóranum og NSÍ viðhaldsmanninum til skammar

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Sunnudagin verður tað grannauppgerð í Runavíkar kommunu. Meistararnir í NSÍ fara at vitja á Skála, og hóast NSÍ er á heiðursmerkjaplássi, og Skála er aftast, so hevur gongdin seinastu ferðirnar verið soleiðis, at talan kann gerast um intensa og spennandi uppgerð.

Í útvarpssendingini hjá NSÍ í gjár segði borgarstjórin í kommununi hjá bæði NSÍ og Skála, at hann roknar við, at NSÍ fer at vinna á Skála. Men í tí rokningini eru teir á Skála ikki samdir við borgarstjóranum:

- Eg hoyrdi tað ikki sjálvur, men eg havi frætt, at borgarstjórin sigur seg rokna við, at NSÍ fer at vinna. Tað er eisini upp til okkum at gera av, hvussu tað verður, og vit halda okkum vera so væl fyri, sum tað ber til, sigur Skála liðformaðurin Pauli G. Hansen.

10. plássið tykist ikki at darva venjingarnar á Skála. Lagið er gott, og fyri fyrstu ferð í ár eru allir spælararnir á Skála tøkir. Nítjan spælarar venja, og venjarin, John Petersen, er í tí sjáldsama positivu støðu, at tað er stór kapping um tey ellivu plássini.

Í Runavík hevur fótbóltslagið verið betri, enn tað er í løtuni. Tey bæði fyrstu umførini eftir summarsteðgin hevur tað hilnast illa. Eftir gott avrik í 1. hálvleiki í Streymnesi endaði tað við tapi, og serliga meint kendist tað at tapa á heimavølli ímóti KÍ síðsta sunnudag.

Sunnudagin spældi landsliðsspælarin Jónas Þór Næs bara í 1. hálvleiki. Hann hevur trupulleikar í fótinum, men hann hevur verið til venjingar í hesi vikuni, og hann verður við á Skála. Tað verður landsliðsspælarin í hinum borðinum, Einar Hansen, ikki. Hann hevur brotið eitt bein og verður ikki førur fyri at spæla næstu vikurnar.

Skála vitjaði í Runavík í 8. umfari. Tá var NSÍ framvegis við í FM stríðnum, meðan tað manningarliga stóð væl verri til á Skála, enn tað nú ger tað. Úrslitið í fyrstu kommunuuppgerðini var 2-2.